KÍF-Neistin 29-30 (14-13):

# Einmansavrik

**Áki Mørk stóð aftan fyri ikki færri enn 17 av neistamálunum, tá Neistin í einum spennandi dysti knógvaði avbjóðarunum úr KÍF**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Alt árið hevur Neistin verið ein hampuliga óvæntaður partur av oddastríðnum. Eftir tapið fyri H71 í seinasta umfarinum var hetta tó eitt heiti, sum var komið í vanda. Kollfirðingar hava nevnliga fleiri ferðir hótt við at taka seg heilt fram í oddin, og sunnudagin høvdu teir kanska besta møguleikan av øllum til tess. Ikki minst eftir at vestmenningar taptu fyri H71 dagin fyri.



*Dia Midjord var hesa ferð ein týðandi partur av Neistaliðnum, og saman við liðfeløgunum var fremsta uppgáva hansara at steðga stórskjúttanum hjá KÍF, Damir Oros*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Alt datt á gólvið

Tað var eisini heilt leingi, at tað var KÍF, sum hevði munin í dystinum. Allan fyrra hálvleik vóru tað teir, sum settu kósina, og tó at Neistin royndi at fylgja við, so gekst hetta ógvuliga striltið. Ikki minst takkað verið einum framúr væl spælandi Óla Krisitan Djurhuus í KÍF-málinum.

Í hinum endanum dúvaðu kollfirðingar sum vant í stóran mun upp á óhugnaligu skotstyrkina hjá Damir Oros, og kvika bóltspælið hjá Mirko Milenkvic, sum avgjørt er ein bóltsnillingur í serflokki..

Soleiðis vóru kollfirðingar á odda, tá farið varð til hálvleiks, men tað var tó skjótt, at hetta varð tveitt fyri borð. Fyrstu fýra minuttirnar av seinna hálvleiki vunnu neistamenn 6-1, og so skuldi tað alla tíðina gerast tungt. Eina løtu sá út til, at teir skuldu komu heilt framat Neistanum, men tá høvdu teir ikki roknað Áka Mørk við. Meðan kollfirðingar av ymsum slag royndu at fylgja við, skeyt Áki ikki færri enn seks fylgjandi mál, soleiðis at Neistin alla tíðina hevði nevið framman fyri.

Og tá KÍF móti dystarenda endiliga fekk tipt skotini frá Áka, sendi Neistin næsta trumfin inn. Kári Mortensen hevur hóast aldurin framvegis framúr hondbóltsevni, og nú tørvurin var størstur, var tað hann, sum við trimum av seinastu fýra málunum syrgdi fyri, at KÍF einki fekk burturúr.

Hóast teir við sigrinum á KÍF hildu fast um ein sess í oddinum, so skerst ikki burtur, at hetta vikuskiftið eisini mundi harma neistamenn nakað. Soleiðis sum úrslitini háttaðu seg, mundi iðranin um tapið fyri H71 í øllum førum ikki gerast minni. Við tveimum stigum afturat, hevði Neistin nevnliga verið einsamalt oddalið í dag, men hinvegin, so sigur hetta helst eisini nakað um, hvussu jøvn besta mansdeildin er í ár.

Og tó at kollfirðingar enn ikki hava fingið fast samband við oddin, so kunnu teir eisini vera við til at økja um hendan spenningin. Tað eru bara trý stig upp til bronsuplássini, men skulu hesi røkkast, so er tað nú um at verða seinasta útkall. Teir báðir komnandi dystirnir hava uppgerðir móti VÍF og StÍF við sær, og fyri kollfirðingar veldst ivaleyst nógv um, hvussu hesir báðir dystirnir verða háttaðir.

### Dysturin í tølum

**KÍF-Neistin 29-30 (14-13)**
Málskjúttar:
KÍF: Damir Oros 10(3), Mirko Milenkvic 5, Petur Martin Poulsen 5, Vagnur Johannesen 3, Regin Petersen 3, Jónálvur Johannesen 3
Neistin: Áki Mørk 17(7), Kári Mortensen 3, Dia Midjord 2, Dann Thorleifsson 2, Morgan Kneevic 2, Helgi Justinussen 2, Ragnar Stakksund 1, Jón Ludvig 1
Brotskøst: KÍF 3, Neistin 7
Útvísingar: Neistin 3
Dómarar úr Kyndli:
Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen.

## Talvúrslit og støða

**1. deild 7. umfar**

| Heima | Úti | Stig |
|---|---|---|
| HT | VT | 2-2 |
| Olaf Berg | John Jacobsen | 1-0 |
| Herluf Hansen | Samson Højgaard | 0-1 |
| Haldur Suni Johansen | Jákup á Rógvi Andreasen | 0-1 |
| Suni Merkistein | Niels O. Durhuus | 1-0 |
| KT | TT | 2-2 |
| Hans Kristian Simonsen | Bogi Ziska | 0,5-0,5 |
| Torbjørn Thomsen | Jens Christian Hansen | 0,5-0,5 |
| Eyðálvur Johannesen | Wensil Højgaard | 1-0 |
| Grettir Djurhuus | Andreas Andreasen | 0-1 |
| TFS | KTF | 1-3 |
| Martin Brekká | Ólavur Simonsen | 0-1 |
| Finnbjørn Zachariassen | Rani Nolsøe | 0-1 |
| Bergur Magnussen | Finnbjørn Vang | 0-1 |
| Gunnar Joensen | Tummas M. Anthoniussen | 1-0 |

**1. deild 8. umfar**

| Heima | Úti | Stig |
|---|---|---|
| TT | HT | 3-1 |
| Bogi Ziska | Olaf Berg | 0-1 |
| Jens Christian Hansen | Herluf Hansen | 1-0 |
| Wensil Højgaard | Óli Joensen | 1-0 |
| Andreas Andreasen | Jákup Thomsen | 1-0 |
| VT | TFS | 1-3 |
| John Rødgaard | Martin Brekká | 1-0 |
| John Jacobsen | Finnbjørn Zachariassen | 0-1 |
| Jákup á Rógvi Andreasen | Bergur Magnussen | 0-1 |
| Rógvi Hansen | Gunnar Joensen | 0-1 |
| KTF | KT | 3-1 |
| Ólavur Simonsen | Hans Kristian Simonsen | 1-0 |
| Rani Nolsøe | Torbjørn Thomsen | 0,5-0,5 |
| Tummas M. Anthoniussen | Eyðálvur Johannesen | 1-0 |
| Ingolf Gaard | Grettir Djurhuus | 0,5-0,5 |

**Støðan í 1. deild eftir 8. umfar**

| Lið | Stig |
|---|---|
| 1. KTF | 19,0 |
| 2. TT | 18,0 |
| 3. TFS | 17,0 |
| 4. HT | 17,0 |
| 5. KT | 16,5 |
| 6. VT | 8,5 |

**2. deild - 7. umfar**

| Heima | Úti | Stig |
|---|---|---|
| HT 2 | VT 2 | 2,5-1,5 |
| RT | ST | 0,5-3,5 |
| HT 3 | KTF 2 | 1,5-2,5 |

**2. deild - 8. umfar**

| Heima | Úti | Stig |
|---|---|---|
| VT 2 | RT | 1,5-2,5 |
| KTF 2 | HT 2 | 2,5-1,5 |
| ST | HT 3 | 4-0 |

**Støðan**

| Lið | Stig |
|---|---|
| 1. ST | 24,0 |
| 2. RT | 18,5 |
| 3. KTF 2 | 17,0 |
| 4. HT 2 | 14,0 |
| 5. VT 2 | 12,0 |
| 6. HT 3 | 10,5 |

# Metskjóting

Tað er sjáldan, at ein einstakur leikari ger eitt somikið gott hál, sum Áki Mørk gjørdi í dystinum móti KÍF sunnudagin. Vit skulu leita nærum trý ár aftureftir fyri at finna líknandi hagtøl, og eisini tá var talan um leikara hjá Neistanum, og eisini ta ferðina var navnið á leikaranum Áki.

25. mars í 2000 eydnaðist nevnliga Áka Olsen at skjóta 17 mál fyri Neistanum, tá Tjaldur var á vitjan í næst seinasta umfarinum, og tey árini, har hagtøl eru tøk, er í øllum førum eingin, sum hevur skotið eins nógv mál. Altso ikki fyrr enn nú sunnudagin.

Tey seytjan málini hjá Áka Mørk í dystinum móti KÍF sunnudagin eru

Hetta var annars ellinta ferðin hesi seinastu fýra kappingarárini, at ein einstakur leikari hevur skotið 15 mál ella fleiri. Sum tað framgongur av yvirlitinum niðanfyri, so hevur Áki sjálvur ongan tíð verið á hesum hæddum áður. Sum sagt, so sýnir yvirlitið teir leikarar, sum hava skotið 15 mál ella fleiri í landskappingardysti tey fýra seinastu kappingarárini.



*Áki hevur skrætt seg leysan og skorar enn eitt av sínum 17 málum í dystinum sunnudagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

-jm

### 17 mál

2002/03: Áki Mørk (Neistin), KÍF-Neistin
1999/00 Áki Olsen (Neistin), Neistin-Tjaldur

### 16 mál

2001/02: Gabrielle Fekete (VB), StÍF-VB
2000/01: Simona Dziugyte (Sóljan), Sóljan Stjørnan
2001/02: Heini Joensen (Neistin), Neistin-H71

### 15 mál

1999/00: John Petersen (StÍF), VÍF-StÍF
2000/01: Gurið Mortensen (VB), Tjaldur-VB
2001/02: Bjarni Wardum (H71), StÍF-H71
2001/02: Heini Joensen (Neistin), VÍF-Neistin
2001/02: Asta Petrauskiene (Sóljan), Sóljan-Kyndil
2001/02: Ioana Rápa (VÍF), Sólljan-VÍF



Kyndil-StÍF 28-26 (14-14):

# Nú hómast heiðursmerkini



*Sonja Smiljic hevur enn ikki fingið nakað serligt av spælitíð - og tí heldur ikki so stóran týdning fyri Kyndil - men sunnudagin var hon millum mest avgerandi leikararnar, tá Kyndil miðskeiðis í seinna hálvleiki togaði seg framum StÍF*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Kyndil fekk í evstu løtu togað sigurin á StÍF heim, men dysturin varð í longum løtum nógv meira spennandi, enn hann nýttist at vera**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir tvey ár í gloymskuni tykjast kyndilskvinnurnar nú av álvara at vera í ferð við at ota seg upp ímóti føroysku hondbóltstindunum. Sunnudagin høvdu tær vitjan av StÍF, og tey bæði stigini, sum hetta kastaði av sær, førdu Kyndil upp á triðja plássið í stigatalvuni, og so ovarliga hava tær ikki verið, síðani á heysti í 1999.

### Málverjin bjargaði

Tað var tó um reppið, at Kyndil als ikki fekk nakað burtur úr dystinum móti StÍF. Ein uppgáva, sum í nógvar mátar gjørdist munandi torførari, enn hon nýttist at vera. Ikki minst tí StÍF í nógvar mátar hevur eitt nógv betri kollektiv enn Kyndil. Eitt kollektiv, sum tó fekk eitt álvarsligt skot fyri bógvin, tá Alina Olaru fekk sína triðju útvísing tíðliga í seinna hálvleiki.

Serstakliga fyrsta korterið ella so var sjónligt, at Kyndil hevði stórar trupulleikar av hart arbeiðandi og væl stríðandi mótstøðuliðnum. Til tíðir sá tað mest sum leikandi lætt út hjá gestunum, tá tær við toli hildu fast í verjupartinum, fyri síðani at revsa uttan náði, tá Kyndil hevði spilt sínar møguleikar. Og var tað ikki fyri Fríðu Petersen, sum bara tykist gerast betri fyri hvønn dystin hon spælir í ár, so kundi væl verið, at Kyndil longu fyri steðgin hevði mist meira, enn gott var.

Bjargingarnar frá hennara síðu bóru við sær, at Kyndil spakuliga fekk um endan, og tá StÍF so beint fyri steðgin mátti spæla við tveimum í undirtali, fekk Kyndil togað seg upp aftur á javnleik.

### Dýr útvísing

Av teimum báðum útvísingunum beint fyri steðgin, átti Alina Olaru aðra, sum var hennara næsta í dystinum. Og tað var skjótt greitt, at Kyndil hevði lagt hetta til merkis. Snildisliga settu tær lágbeintu Ileanu Manolescu beint á meira langlimaðu Alinu, tá seinni hálvleikur byrjaði, og tað gekk heldur ikki leingi, áðrenn hetta gav úrslit, og so mátti StÍF vera kanska mest týðandi leikaran fyriuttan restina av dystinum.

Men hóast hetta, so tók tað sína tíð, áðrenn Kyndil fekk veruliga yvirtakið í dystinum. Frágreiðingarnar kunnu vera so nógvar, men ein teirra er ivaleyst, at Kyndil í ovurstóran mun leggur ábyrgdina fyri dystin á herðarnar á einum leikara. Eingin ivi er um, at Lotte Sørensen er millum mest gávaðu leikararnar í føroyskum kvinnuhondbólti, og fáur – um nøkur – kann sum hon avgera ein dyst, tá lagið er hitt rætta. Men tað er merkisvert, at Kyndil við leikarum sum Annika Ljósstein, Ileanui Manolescu og nú eisini Sonju Smioljic, ikki eisini leggur ábyrgd á hesar. Júst Sonja var annars kanska leikarin, sum skapti munin, tá hon varð send á vøllin í seinna hálvleiki. Kanska er hon enn ikki spæld inn á liðið (og tað verður hon ikki av beinkinum), men kropsliga styrki hennara tóktist avgerandi, tá hon varð sett inn á strikuna, og við trimum royndum sendi trý mál í kassan aftan fyri annars væl spælandi StÍF-málverjan.

### Mistu á stokkinum

Hetta var viðvirkandi til, at Kyndir fyri fyrstu ferð í dystinum fekk togað seg framum, og so ráddi um at halda fast. Hetta vísti seg tó at vera sera trupult, tí hóast mansverju av Astu Petrauskiene, so kundi hendan ikki nýtast við tríggja metra kast, og tá StÍF ferð eftir ferð framvegis sýndi tol í álopspartinum, so slapp stóri litavin fleiri ferðir at royna seg, og so var ikki stórvegis, sum Kyndil kundi gera.

Og spenningurin helt sær heilt fram til seinasta minuttin, men tá sama Asta við støðuan 27-26 misnýtti brotskast, var liðugt. Í næsta álopinum skoraði Kyndil, eftir at leikararnir høvdu vunnið returbólt, og so var liðugt. Tað kann kanska viðmerkjast, at dómararnir kanska vóru dekan ov skjótir at bríksla, tá StÍF fekk seinasta brotskasti, soleiðis at tær samstundis mistu eitt mál, men tað kunnu tær hjá StÍF ikki nýta til nakað. Stðafestingin var, at dysturin var taptur.

### Partur av oddinum

Fyri StÍF merkir tapið ivaleyst, at tær nú eru heilt úti úr heiðursmerkjastríðnum, sum tær annars hava verið partur stóran part av árinum. Enn er alt tó ikki liðugt í so máta, tí við eitt sindur av hepni ber til at vinna seg aftur í hetta, tá komandi dystirnir móti ávíkavist Stjørnuni, Tjaldri og Neistanum eru á skránni.

Hjá Kyndli man lagið hinvegin vera gott, nú liðið loksins tykist gerast partur av hondbóltsoddinum aftur. Enn er ikki rættiligt samband upp til VB og VÍF, men sum kappingin hevur verið í ár, er tað helst eisini fyrst og fremst bronsan, sum Kyndil kann fáa fatur á. Skal talan gerast um meira, so verður í øllum førum neyðugt við fullari úrtøku, tá VB kemur á vitjan í næsta dystinum.

### Dysturin í tølum

Kyndil-StÍF 28-26 (14-14)
Málskjúttar:
Kyndil: Lotte Sørensen 11(4), Marjun Tróndarson 4, Sonja Smiljic 3, Ileana Manolescu 3, Heidi Maria Akselsen 3, Ann Mari Wang 2, Jensia Petersen 2
StÍF: Asta Petrauskeine 10(2), Anna B. Danielsen 4, Sunfríð B. Jacobsen 3, Poula D. Olsen 3, Anna Maria Berthelsen 3, Alina Olaru 2, Elin JAcobsen 1
Brotskøst: Kyndil 5, StÍF 3
Útvísingar: Kyndil 4, StÍF 4
Diskvalifikatión: StÍF 1 (3X2 minuttir)
Dómarar úr Neistanum: Sámal Hansen & Kristian Johansen. Hóast smávegis brek altíð kunnu finnast, so fingu teir fyri tað mesta dystin at glíða.